Religión og modernitetur

# Deyðin hevur ikk

**Hann er sannførdur kristin, men hann er andaliga heimleysur og vil ikki kennast við tann kristindóm, sum í stóran mun verður boðaður her á landi. Vit hava hitt 26 ára gamla tónleikaran Knút Háberg Eysturstein til eitt prát um trúnna, sum gevur frælsi, skaðiliga gudsdyrkan, andaligt hvíldarloysi og um deyðan, sum ikki hevur seinasta orðið. Lesið áttanda part í greinarøð um trúgv og modernaða menniskjað**



## Samrøða




**Heini í Skorini**
heini@sosialurin.fo


– Ávísir føroyskir politikarar skilja eftir øllum at døma ikki ímillum tað at vera politikari og tað at vera trúboðari. Og m.a. tí er tað mangan torført at viðurkenna seg sum kristnan. Man fær eitt spjaldur og verður settur í ein bás, sum man als ikki vil kennast við.

Orðini eigur 26 ára gamli tónleikarin Knút Háberg Eysturstein. Hann er trúgvandi kristin. Uppvaksin í brøðrasamkomuni. Men andaliga heimleysur. Hann vil ikki kennast við tann kristindóm, sum í stóran mun verður boðaður her á landi. Hann er troyttur av smølum og vanabundnum kristindómi. Og um tað skal vera pláss fyri Knúti og hansara líkum, mugu kirkjur og samkomur moderniserast. Trúarlívið endurnýggjast. Gudstrúgvin definerast av nýggjum.

– Eg krympi tærnar, tá eg síggi og hoyri, hvussu summir politikarar reklamera við kristindóminum. Tá politikarar við sínum lógarsmíði favorisera ávísar bólkar og ikki viðurkenna eitt felags grundarlag fyri allar borgarar í einum pluralistiskum samfelagi. Kristindómurin hevur altso uppiborið betri PR enn tað, sum hesir menn geva honum, letur í Knúti.

### Uppgerð

Vit sita í Miðlahúsinum í Vágsbotni, og kaffið er komið í kopparnar. Síðhærdi keyboardleikarin, sum vit best kenna frá bólkum sum Gestir og Marius, situr yvirav mær. Í 2004 royndi hann seg eisini sum solist við fløguni Havsglóð, og innihaldið í tónleiki hansara vendir sær í stóran mun móti hægri hæddum. Móti tí yvirnatúrliga. Móti trúnni. Móti Gudi.

Men trúgvin er sambært Knúti vorðin ov reglukend. Gudsdyrkanin ov banal. Og siðvenjurnar ov heilagar. Hann dregur síða hárið frá pannuni og leskar góman við kaffi, áðrenn hann svarar mær, hvat kristindómurin so er fyri hann.

– Fyri meg er kristindómurin frælsi og næstrakærleiki. Hvørki meiri ella minni. Og tá meini eg við eitt andaligt frælsi í ævigum perspektivi. Jesu náðiboðskapur var jú radikalur, tí alt er okkum fyrigivið. Men hetta skínur illa ígjøgnum, um vit hyggja at tí almenna andlitinum, sum kristindómurin hevur í Føroyum. Tvørturímóti. Bæði kirkjur, samkomur og teir politikarar, sum siga seg umboða kristindómin, hava gloymt henda boðskap, sigur Knút Háberg Eysturstein.

Tí fellur hann sjálvur uttan fyri stóran part av kristna umhvørvinum her á landi. Og tí sigur hann seg hava blandaðar kenslur yvirfyri kristindóminum.

– Alt tað, sum vit menniskju gjøgnum tíðina hava lagt afturat kristindóminum, hevur svertað myndina av tí, sum upprunaliga var gott og virðismikið. Og frá miðøldini og fram til í dag hevur okkara statsreligión eftirhondini fingið so nógv keðiligt í viðførið, at tað kann vera trupult at viðurkenna, hvør man er, sigur Knút.

Sjálvur mælir hann til at bróta upp úr nýggjum. At gera upp við siðbundnar og snævurskygdar hugsanir um, hvat tað vil siga at vera kristin.

### Æviga leitanin

Men um Knút hevur eitt so ambivalent forhold til kristindómin, hví kallar hann seg so framvegis kristnan? Hvat trýr hann í veruleikanum á? Og hví gerst munurin so stórur millum hann og tey, sum hann finnist at? Knút hyggur út gjøgnum vindeyga, grunar eina løtu í tøgn, fær sær meiri kaffi og byrjar at greiða frá.

– Eg trúgvi, tí eg kann ikki annað. Trúgv er trúgv, og henni kann eg ikki grundgeva fyri logiskt ella rationelt. Tað er og verður mín egna subjektiva uppliving. Mítt endamál er heldur ikki at prógva nakað fyri nøkrum. Eg upplivi bert, at tilveran rúmar meiri enn bert tann fysiska heimin, sum vit kunnu máta, viga og sansa, greiðir Knút frá.

Tí er trúgvin á Gud ein stórur partur av hansara lívi. Og ikki bert

Sosialurin